# Í Sundalagnum ein sólskinsdag

Tekstur: Snorri Brend
*Myndir: Jens Kristian Vang*



Mikudagin í farnu viku endaði sum ein av teimum vøkru sólskinsdøgunum í Sundalagnum. Hóast regnið oysti niður fyrrapartin, so dagaði sólin undan um middagsleitið og gav fólki ein góðan og sólríkan dag. Henda dagin var redaksjónin á Oyggjablaðnum á vitjan í økinum, og við myndum vísa vit nakað av tí sum hendi í Sundalagnum seinnapartin.



**ØÐRVÍSI**

*Tey seinnu árini eru nógv nýggj sethús bygd á Langasandi. Í løtuni stendur enn eitt í gerð av slagnum: "heldur øðrvísi sethús". Kann vera, at húsini eru serstøk, men tað er útsýnið so sanniliga eisini*



**SÁPA**

*Í góðveðrinum var henda gentan farin sær útum ein túr í heimbygdini Norðskála við nýggjastu ogn síni - sápublørunum. Vindurin er júst tilpass, soleiðis at blørurnar fara sendandi í lotinum*